# Reyni Service - ein fyrimynd




Mynd: Heðin Weihe

**Nýggi sølu- og framsýningarbygningurin hjá Reyni Service í Hoyvík varð sýndur fram fyri almenninginum fríggjadagin 19. desember**

*Myndir: Álvur Haraldsen*

Móttøkan byrjaði kl. 13.55 við at Bet You Are William spældu. Eftir tað bjóðaði Eivind av Reyni øllum at vera vælkomin, og kl. 14.30 helt Bjarni Djurholm røðu. Bjarni tosaði m.a. um at Reyni Service er kend sum tann fremsta bilfyritøkan í landinum og hevur verið ein fyrimynd hjá øðrum fyritøkum. Hetta varð alment viðurkent, tá fyritøkan gjørdist Ársins Virki í 2004.

Stúgvandi fult av fólki vóru komin til móttøkuna í stásiligu hølunum. Umframt Bet You Are William sungu eisini Laila av Reyni og Linda Andrews.

Nýggi bygningurin er gjørdur í samráð við Toyota, eftir tí teir nevna »Retail Concept«, og bygningurin líkist øðrum Toyota bilasølum úti í heimi við øllum tí sum har til hoyrir.

Framsýningarhøllin er upp á tilsamans 440 fermetrar og eykalutagoymslan er á 200 fermetrum.

Pláss er til 10-12 bilar í framsýningarhølinum, sum partvís er tveimum hæddum. Í ovaru hæddini er umsiting og fundarhølir.

Reyni Service er ein gomul fyritøka, sum tey fyrstu yvir 30 árini helt til í Rættará, og nú hevur fyritøkan verið í Hoyvík 30 ár. Hóast bygningurin í Hoyvík fleiri ferðir hevur verið víðkaður, umbygdur og dagførdur, er hetta størsta útbygging og nútímansgerð, sum nakrantíð hevur verið gjørd her á staðnum, sigur Eivind av Reyni, stjóri hjá Reyni Service.

**mg.**



*Eivind av Reyni bjóðar vælkomin*



*Rósing Rasmussen, sum byrjaði at selja Toyota í 1963, var komin úr Runavík*



*Árni Øregaard spælir og Laila av Reyni syngur*



*Bjarni Djurholm heldur røðu*





*Stúgvandi fult av fólki var komið til móttøkuna í nýggja sølu- og fyrisitingarbygningin hjá Reyni Service í Hoyvík*